# Fólkaflokkurin brúkar Johan Dahl sum skálkaskjól

ATLI HANSEN



**Fólkaflokkurin setur fokus á Jóhan Dahl fyri at taka fokus frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum! Hesin skal hava frið til at arbeiða við síni bróðurliga býti av svartkjaftakvotuni. Hann og hansara umsiting troyngja annars alvorliga til eina kanning**

Nógv tíð og orka verða nýtt fyri at kroysta Jóhan Dahl til ikki at handla við skili. Sum ein hvør skilagóður partaeigari vil hann hava mest møguliga ávirkan fyri síni partabrøv, og tá ið hann umboðar eigaran av 2/3 av partapeninginum í einum felag, vil hann hava hetta at síggjast aftur í nevndarsamansetingini.
So einfalt er tað.

Ein annar landsstýrismaður, Jacob Vestergaard, er í ferð við at býta fólksins ognir eftir sjálvgjørdum princippum – og hetta er ikki fyri sartar sálir.
Í Felagnum Nótaskip hevur tað allar dagar verið semja um, at tá ið svartkjafturin eina ferð skuldi býtast, so skuldi tað sum fall í lut til nótaskipini býtast javnt millum hesi. Men í sínum vísdómi letur landsstýrismaðurin summar fáa dupult so nógv sum aðrar. Kundi hann ikki greitt Føroya fólki frá, á hvørjum grundarlag hann ger hetta býti? Ella hví tað skipið, sum hevur hildið lív í svartkjaftafiskiskapinum øll árini, meðni hini hava hoppað út og inn, bert skal hava hálvan part?
Í útgangspunktinum høvdu øll hesi skipini sama loyvi og hava í innflutningsloyvum frá landsstýrinum fingið at vita, at man skal hava somu rættindir sum hini pelagisku skipini.

Hvar er hesin javnrætturin blivin av? Og skip sum ikki hava fiskað eitt einasta kilo av svartkjafti kunnu nú fáa sama loyvi sum tey skipini ið hava fiskað tað søguligu nøgdina.
Og hettar endar júst upp á sama máta, sum tá ið Jørgen Niclasen sum fiskimálaráðharri lutaði kvotur til Fram og Pelagos, tí teir skuldu byggja nýtt skip. Stutt aftaná vórðu kvoturnar seldar. Dagin eftir at svartkjaftakvoturnar eru útlutaðar, vilja vit síggja tað sama: eitt stórt útboð av kvotum frá skipum, sum ongantíð hava luttikið í hesum fiskiskapi.
Eg taki álopið á Jóhan Dahl sum eitt satt fólkafloksfyribrygdi. Jú meira øsing man fær skapt rundan um Jóhan Dahl, jú minni sæðst til fiflaríðini hjá fiskimálaráðharranum. Hetta eigur onkur at gera vart við. Og tá má tað helst vera andstøðan, tí javnaðarflokkurin segði hetta bara vera smáting í degi og viku – eingin kabinettspurningur.
Men hvar er tann føroyska pressan? Hvar var hon, tá ið ruslandssáttmálin varð gjørdur? Ella tá ið eyka makrelkvota varð fingin til vega? Hon ringdi til landsstýrismannin og fekk at vita, at hann var væl nøgdur, og at vit høvdu fingið ein góðan sáttmála. Finito. Spann ein enda yvir tað, og so var alt helst sera gott.
Eingin spurdi hvat og hví og hvussu. Hann sleppur ov lætt hvøja ferð, tí eingin borar ella hyggur nærri at grundgevingum fyri at gera sum hann ger.
Takið tykkum nú saman um vit skulu virða tykkum sum 4. statsmaktin.

# Almenna koyrikortið ein trygd

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður, vegna Sjálvstýrisflokkin



Tað kemur óvart á Sjálvstýrisflokkin, at uppskotið um alment koyrikort hevur loypt øði í onkrar koyrilærarar. Uppskotið er fyrst og fremst sett fram við ferðslutrygdini í huga, men eisini við tí í huga at tryggja viðurskiftini hjá koyrilærarunum.
Ætlanin hjá Sjálvstýrisflokkinum við uppskotinum um alment koyrikort er at tryggja eina eins skipaða frálæru, so øll fáa somu frálæru, tillagað tørvinum hjá tí einstaka.
Sjálvstýrisflokkurin undirmetir als ikki føroysku koyrilærararnar, men vil heldur tryggja teimum góð og trygg viðurskifti, til frama fyri ferðslutrygdina.
Í dag kann koyrikortið sigast at vera ein mannarættur. Tí metir Sjálvstýrisflokkurin, at tíðin er komin, at koyrifrálæran verður samskipað frá barnagarði til tann dagin, næmingurin stendur við koyrikortinum til bil í hondini.
Tað harmar tí Sjálvstýrisflokkin almikið, at uppskotið um alment koyrikort, sum er sett fram við ferðslutrygdini í huga, er vorðið so misskilt av ávísum koyrilærarum.

# Mentan

SÍMUN MITTÚN

Í drúgvari grein í bløðunum er mín góði vinur og frændi, Torbjørn Jacobsen, bangin fyri, at okkara mentan er við at fara fyri bakka, og tíðin er komin til nýggjan jólafund.
Serliga er tað sjónvarps mentanin, ið hann er bangin fyri, ja, somikið bangin, at hann ikki vil hava eitt slíkt tól í stovu síni, fyrrenn tann føroyski samleikin kemur brølandi út úr skerminum.
Á landsfundinum hjá tjóðveldinum í Skálavík hoyrdust somu undirtónar.
Eg haldi bara, at Tobbi og aðrir síggja trøll á alljósum degi, tí ongantíð hava okkara listafólk klára seg so væl sum nú. Til dømis hava flest allar undirhaldssendingar í danska sjónvarpinum, í áravís, havt føroyskar luttakarar, tann aktuella Linda í X-factor, er gott dømi um hetta.
Eisini myndlistafólk og innan ljóðføri hava tey havt góð úrslit t.d. í Danmørk.
Men ikki bara í tí ónda Danmark, gera føroysk listafólk um seg. Eg kann nevna Ísland, har tey hava víst sera góð úrslit, og fara vit longur út í verð, so er Teitur Lassen og Sunnleif Rasmussen góð dømir um hetta.
So Tobbi og aðrir, verið ikki so neiðligir, vit hava ikki nakað at skammast um, tá tað kemur til mentan, og eg haldi at vit er mong, ið eru rættuliga stolt av hesum okkara kvinnum og landsmonnum.

Matseðil
Hósdagin 26. mars
Karrygrýta / Krebinettir
Fríggjadagin 27. mars
Chilli con Carne / Nakkasteik
Leygardagin 28. mars
Svínakambur
Mánadagin 30. mars
Knettir / Rivjasteik
Týsdagin 31. mars
Forlorin hara / Kókað neytakjøt
Mikudagin 1. apríl
Stoktur høsnarungi / Stoktur fiskur
Til ber at keypa døgurða við heim
Matstovan í Hoyvík

Nýtt teoriskeið
Nýtt teoriskeið til PERSÓNBIL og MOTORSÚKKLU byrjar mikudagin 25 marts kl. 17.00.
Nytt teoriskeið til LASTBIL, TRAILARA og BUSS byrjar mikudagin 25 marts kl. 19.00.
– tað koyrir bara!
★★★★★ undirvísing
KOYRISKÚLIN BJ
Við Bjarka Johannesen · Undir Gráasteini 61
100 Tórshavn · Tlf. 21 48 45

www.inventar.fo
Sølu- og avgreiðslufólk
Starvsfólk søkist til fjølbroytt arbeiði, ið umfatar vanligt skrivstovuarbeiði, sølu / innkeyp, kundarøkt, avgreiðslu og uppsetan av innbúgvi.
Umsøkjarin má vera fyrikomandi, duga at arbeiða sjálvstøðugt, hava góðan teldukunnleika, og somuleiðis verða handaligur.
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi seinast 30. mars 2009.
Starvssetan skjótast til ber, men vit eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jørgen Petersen, tel. 353800/223800.
INVENTAR TÆNASTAN
Heygsvegur 33
Postsmoga 1002
110 Tórshavn
Tel 35 38 00
Fax 35 38 01
inventar@inventar.fo

www.sosialurin.fo